VIÐTØKUR
fyri
**Samlagstryggingargrunn Starvsfelagsins**

## Grein 1: Navn og heimstaður

Navn grunsins er Samlagstryggingargrunnur Starvsfelagsins.
Heimstaður grunsins er Tórshavn.

## Grein 2: Endamál

Endamál grunsins er vegna limirnar, at umsita inngjøld og keypa eina samlagtrygging, ið fevnir um lívstrygging og aðrar veitingar, sum aðalfundurin ásetur. Hetta verður gjørt sum eitt ískoyti til eftirlønarskipan Starvsfelagsins, ið er avtalað við Føroya Lívstrygging.

Limirnir eiga grunnin og ognir grunsins kunnu ikki nýtast til annað endamál, enn ásett í hesum viðtøkum.

## Grein 3: Limaskapur

Rætt til limaskap hava teir limir Starvsfelagsins , ið koma undir eftirlønarskipan felagsins, umframt tey, sum eftir serligari avtalu við Starvsfelagið hava fingið loyvi til framhaldandi limaskap í grunninum, hóast inngjaldið til persónligu eftirlønina er steðgað.

Møguleika fyri at gera eina serliga avtalu um framhald í grunninum, hava limir, sum fara av arbeiðsmarknaðinum vegna

- arbeiðsloysi
- barnsburðarfarloyvi uttan løn
- útbúgving
- aldur áðrenn fylta 67 ár.
- onnur serlig føri

Eisini er møguleiki fyri at søkja um framhaldandi limaskap, tá ið farið verður í annað starv, sum liggur uttanfyri sáttmálaøkið hjá Starvsfelagnum, og sum ikki er fevnt av aðrari fakfelagsavtalu.

Nevndin í grunninum tekur í hvørjum einstøkum føri støðu til framhaldandi limaskapin og verður hesin bert játtaður eftir umsókn.

Gjaldið fyri limaskap verður ásett av ársaðalfundinum.

## Grein 4: Inngjøld til samlagstryggingargrunnin

Nevndin í grunninum gevur Starvsfelagnum tilmæli um, hvussu stórur partur av tí samlaða prosentgjaldinum til eftirløn skal fara í grunnin. Aðalfundur felagsins tekur endaliga avgerð um býtið.

## Grein 5: Rættin til og støðd á lokaupphædd

Grundarlagið fyri ásetingini av lokaupphæddini verður gjørt sum ein partur av samlagstryggingini, ið grunnurin teknar hjá Føroya Lívstrygging.

Allir limir í Starvsfelagnum, sum lúka treytirnar í grein 3, eru fevndir av avtaluni um samlagstrygging.

Rætt til lokaupphædd hava arbeiðandi limir, sum hava goldið inn í grunnin, umframt tey, sum eftir serligari avtalu við Starvsfelagið hava fingið loyvi til framhaldandi limaskap í grunninum og sum í útgjaldingarárinum fylla 67 ár.

Fyri at hava rætt til fulla lokaupphæd krevst, at tann, sum fær útgjaldið, hevur verið limur í grunninum síðan fylta 60 ára aldur. Um so er, at limaskeiðið er styttri, minkar lokaupphæddin við 1/8 fyri hvørt árið, sum restar í at røkka fulla tíðarskeiðinum.

Nevndin kann í serligum føri játta, at ein niðursett lokaupphædd verður útgoldin til limir millum 60 og 67 ár, sum fara úr starvi. Ein slík útgjalding er endalig, og limurin hevur ikki framhaldandi krøv móti grunninum.

Tekniska grundarlagið fyri veitingum er tað loyvi (koncessión), ið Føroya Lívstrygging nýtur í samband við samlagstrygging.

Nevndin fyri grunnin ásetur í sáttmála við Føroya Lívstrygging , hvussu stór lokauphæddin skal vera.

**Grein 6: Nevndin**

Grunnurin verður stjórnaður av eini nevnd, ið telur 3 limir. Formaður Starvsfelagsins er fastur limur í nevndini. Aðalfundur grunsins velur hinar báðar nevndarlimirnar. Valdur verður ein eykalimur, sum tekur við, tá einum av hinum berst frá, og ikki ber til at bíða við fundi.

Nevndin skipar seg sjálv og velur sjálv formann og skrivara sínámillum.

Nevndin ger sjálv sína starvsskipan.

Nevndin førir fundarbók um tær avgerðir, sum verða tiknar á nevndarfundi. Allir nevndarlimir, sum eru á fundi, skriva undir fundarbókina.

**Grein 7: Tekningarreglur**

Grunnurin verður teknaður av øllum trimum nevndarlimunum í felag.

Nevndin kann veita prokura.

**Grein 8: Roknskapur**

Roknskaparárið er álmanakkaárið. Roknskapurin verður grannskoðaður av góðkendum grannskoðara. Føroya Lívstrygging skipar fyri og rindar kostnaðin av grannskoðanini.

**Grein 9: Aðalfundurin**

Aðalfundur grunsins verður hildin í februar/mars mánaði - í fyrsta lagi 3 vikur undan og í seinasta lagi 3 vikur eftir regluliga ársaðalfundin hjá Starvsfelagnum. Um hóskiligt verður hann hildin sama dag sum regluligi ársaðalfundurin hjá Starvsfelagnum.

Boðað verður til aðalfundar við dagsskrá í minsta lagi 14 dagar frammanundan við kunngerð á heimasíðu Starvsfelagsins og boðum gjøgnum álitisfólkini til allar limir.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu, herundir uppskot til broytingar í viðtøkunum, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi 7 dagar áðrenn aðalfundurin verður hildin

Á vanliga ársaðalfundinum verður viðgjørt:

1. Val av fundarstjóra
2. Frásøgn um virki grunsins í farna roknskaparári
3. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
4. Umrøða av innkomnum uppskotum
5. Møguligar viðtøkubroytingar og áseting av gjaldi sbr. Gr.3
6. Val av nevndarlimum
7. Ymiskt

Á aðalfundinum verða øll mál at gera av við vanligum atkvøðumeiriluta.

Til at samtykkja broytingar av viðtøkum grunsins, krevst tó samtykt við 2/3 av greiddum atkvøðum.

Eykaaðalfundur verður hildin, tá nevndin heldur tað vera neyðugt, ella tá meira enn 100 limir fyri nevndini skrivliga seta fram krav um tað við nágreiniliga tilskilaðari fundarskrá.

Eykaaðalfundurin skal fráboðast við í minsta lagi 14 daga freist og á sama hátt sum ársaðalfundurin. Í heilt serligum føri, sum hava bráðskund, og sum kunnu hava við sær munandi virðistap fyri grunnin ella limirnar, kann innkallingarfreistin vera styttri.

**Grein 10: Avtøka av grunninum**

Grunnurin kann bert takast av, tá ið hesar treytir eru fylgdar:

1. Lýst verður lógligа til eykaaðalfundar, á sama hátt, sum lýst verður til aðalfundar hjá Starvsfelagnum.
2. Avtøka grunsins má verða tilskilað á fundarskránni. Á skránni má einans vera uppskot um avtøku av grunninum.
3. 2/3 av limum felagsins mugu vera møttir á fundi.

Av teimum møttu limunum mugu ¾ greiða atkvøðu fyri avtøku av grunninum.

Eru ikki nóg nógvir limir møttir til fundar, kann verða boðað til nýggjan eykaaðalfund við somu dagsskrá, og er hesin fundur tá altíð viðtøkuførur við ¾ av teimum møttu. Ikki mugu ganga meira enn 14 dagar frá hesum fyrra til tann seinna fundin.

Samtykkir aðalfundurin at taka grunnin av, skal fundurin eisini taka avgerð um, hvat endamál ognir grunsins kunnu nýtast til.

*Broyting: Viðtøkurnar einmælt samtyktar/broyttar á regluligum ársaðalfundi tann 23. februar 2017*

*Seinasta broyting: Navnabroyting á aðalfundi grunsins 25. febr. 2021*